## Microsoft-eigari vil keypa Southampton

Ein av ríkastu monnunum í heiminum er Microsoft-stovnarin Paul Allen. Hann er sambært blaðnum The Evening Standard til reiðar at keypa enska Premier League felagið Southampton. Blaðið heldur seg vita, at Paul Allen er til reiðar at bjóða núverandi eigarum einar 500 milliónir krónur fyri at fáa hendur á felagnum, sum í løtuni spælir í næstbestu ensku fótbóltsdeildini.

## Wenger umhugsar framtíðina



Franski venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger, umhugsar sína framtíð í Arsenal. Wenger roynir at spæla eitt nýtt, ungt Arsenal-lið saman, og sambært Wenger sjálvum fara avrikini í næsta kappingarári at gera av, um hann vil halda fram í felagnum, har hann hevur verið venjari síðani 1998.
- Eg vil menna hetta liðið, men eg má verða fegin um úrslitini eisini. Í løtuni eri eg ikki nøgdur við støðuna, men eg ætli mær í øllum førum at halda mín sáttmála, sigur Wenger við Eurosport. Hann hevur eitt ár eftir av avtaluni við Arsenal.

## Góð avrik í FM-kappingini

Metini trutu ikki, tá FM-kappingin í svimjing varð hildin um vikuskiftið. Úrslitini vóru sum heild heilt góð, og Malan Bærentsen, Pál Joensen, Kristian Olsen, Jutta Thomsen, Kári á Høvdanum, Elspa Mørkøre og Shaila millum Garðarnar settu øll nýggj føroysk met. Hartil vórðu met sett í 4X100 metrar frí og blandað hjá kvinnum og í 4X50 metrar frí hjá kvinnum.
Í blaðnum í morgin verður meira gjørt burturúr FM-kappingini.

*-mørk*

## Rúni fekk umbering frá B36

Móti endanum av dystinum millum B36 og AB kom stadion-varparin í andlettin, tá hann spældi Beatles-lagið, Yellow Submarine. Sjálvur segði hesin eftir dystin, at hetta var til AB-áskoðararnir, sum nýttu sama lagið at syngja "Vit eru enn í steypakappingini", men av onkrum varð hetta eisini fatað sum skot til dómaran, ið hevði gula kortið frammi rættiliga ofta.
Hvussu var og ikki, so eru reglurnar púrasta greiðar á hesum økinum. Og tað gav dómarin eisini til kennar eftir dystin.
- Vit høvdu ein fund við dómaran eftir dystin, og hann gjørdi okkum greitt, at hetta hoyrir ikki heima. Vit hava eisini givið honum eina skrivliga umbering fyri hendingina, sum ikki sleppur at endurtaka seg, sigur Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn.

*-mørk*

VB/Sumba-Skála 0-1 (0-0):

# Tvær ferðir fult til John

**Stigaleyst botnpláss hjá Skála eftir fýra umfør er broytt til seks stig og støðu røttu megin keðiligu strikuna eftir seks umfør**

*VB/Sumba*

*Skála*

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Vindurin gjørdi sítt fyri at darva fótbóltsspælinum í Vági. Men skuldi ein vinnari finnast, so var Skála tó betra boðið
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Fýra umfør og einki stig á Skála. Nevndin tók skjóta avgerð, venjarin varð skiftur út, og tað er vorðið sum broyting, sum er íkomin, eftir at ítróttarikonið á Skála, John Petersen, hevur tikið um stýrisvølin.

### Ónøgd um málið

Áðrenn John yvirhøvur var komin til landið, hevði Skála vunnið trý stig í Gøtu, og í fyrstu royndini eftir at gamli kenningurin og nýggi venjarin í einum og sama persóni hevði havt spælararnar undir hond í nakrar fáar venjingar, komu teir norður aftur av Vágseiði við fullari úrtøku.
Skála vann 1-0, og einsamalla og sera týdningarmikla málið lat bíða eftir sær, inntil tíggju minuttir fyri leiklok.
Bogi Gregersen, sum var innskiftur fyri Obi, tá ið tað restaði lítið korter, streyk til baklinjuna í høgru, legði innfyri og stóri nýggi framrættaði serbiski maðurin hjá Skála, Slavisa Kaplanovic stýrdi bóltinum í málið aftanfyri fyrrverandi Skála málverjan Vlada Filipovic.
Stórur fagnaður í Skála leguni og ikki sørt av misnøgd í heimaleguni. VB/Sumba spælararnir vístu á, at meðan Skála spældi seg ígjøgnum til møguleikan, sum bar einsamalla málið við sær, lá Jákup Olsen skaddur á vøllinum. Tað kundi sæð út sum um, at hetta var ein av orsøkunum til, at eftiransingarnar í júst hesi løtuni ikki vóru so tættar hjá heimaliðnum.

### Betri ímóti

Tølini siga, at VB/Sumba ikki er væl fyri. Hetta var fimta uppgerðin á rað, sum teir einki fingu burturúr. Blaðungi Hans Jørgensen vardi Skála málið fyri aðru ferð á rað, og aftur hesa ferð fór hann av vøllinum uttan at hava verið í meskunum eftir bóltinum.
At verja málið í Formula deildini er sjálvandi stór avbjóðing hjá blaðungum dreingi, men Hans Jørgensen man ofta hava havt meiri at takast við millum stólparnar, enn hann hevði tað hesa ferð.
VB/Sumba avrikið var ikki gott. Teir funnu illa hvønn annan, ofta varð sparkað í staðin fyri spælt, og tá ið teir royndu, vóru sendingarnar óneyvar. Harvið gjørdist tað eyka tungt og torført, tí setningurin fyri tað mesta var at renna aftaná mótstøðumonnunum.
Í verjupartinum royndu teir ofta at seta rangstøðufellu, og tað vóru teir fleiri ferðir um ein háls av.
Skála hevði fitta lotið undan í 1. hálvleiki. Tá hekk samanspælið væl saman, men tað eydnaðist ikki at fáa úrtøku, hóast teir spældu seg til fýra stórar málmøguleikar. Obi, Slavisa og Levi mísnýttu ímóti gamla liðfelagnum Vlada Filipovic, og tá ið tað eydnaðist Levi Hanssen at fáa bóltin í málið, varð hann kolldømdur fyri rangstøðu.
Eftir steðgin var tað torførari hjá Skála undan lotinum, og tað var farið at lukta av málleysum javnleiki. Men so eydnaðist tað kortini hjá Skála.

# Ikki pláss fyri Paula

**Skála liðformaðurin fegnast um góðu gongdina seinastu ferðirnar, sum hann heldur tað vera fleiri orsøkir til**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Pauli G.Hansen sat á Skála beinkinum fyrra umfarið í Vági. At siga at hann var avsettur er at taka ov rívan til.
- Eg havi ligið sjúkur, og eftir langan skaðasteðg er formurin ikki hundrað prosent. Eftir sigurin í Gøtu var eingin orsøk at broyta liðið. Eg kom á vøllin eftir steðgin, tí Pætur Dam Jacobsen, sum hevði spælt framúr væl, ikki kendi seg so væl, greiður Pauli frá.
Er tað venjaraskiftið, sum er orsøkin til, at tað nú gongur so væl?
- Vit hava vunnið tvær ferðir. John var ikki komin til landið, tá ið vit vunnu í Gøtu. John hevur høga stjørnu á Skála, og tað hevur heilt víst týdning, at øll kenna hann, og at hann kennir øll. Hann dugir eisini sera væl at fara við fólkinum. Men tað hevur eisini týdning fyri avrikini, at vit nú hava so at siga alt fólkið tókt. Málverjin er farin heim í feriu, eftir at hann hevur verið sjúkur, men Hans Jørgensen hevur klárað uppgávuna fínt. Nú er tað bara Tony Rasmussen, sum ikki er komin fyri seg. Serliga í lítlum felag hevur tað stóran týdning, at fólkið er tókt, heldur Pauli G. Hansen.
Nú eru tveir heimadystir á skránni. Mikukvøldið fer B71 at vitja á Skála, og sunnudagin fara klaksvíkingar út á Skála:
- Vit taka ein dyst í senn. Gongdin higartil hjá okkum vísir, hvussu skjótt tað kann venda. Tað ræður um at hava fokus á einari uppgávu, heldur Skála liðformaðurin.